**Leiðbeining til lærarar**

# Føroyskt

**7.-9. floksstig**

**1. august 2023**

Krøvini til lærugreinina føroyskt eru ásett í námsætlanini í føroyskum 1-A og í støðisnámsætlanini. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlanum eru markað við skákskrift.

## Tilhoyrandi skjøl

- Námsætlan – føroyskt 1-A
- Støðisnámsætlan
- Metingarark – skrivlig próvtøka – føroyskt 9. floksstig
- Leistur – próvtøkuspurningur – próvtøkuháttur A – føroyskt 9. floksstig
- Leiðbeining – próvtøkuspurningur – próvtøkuháttur A – føroyskt 9. floksstig
- Leiðbeining – próvtøkuháttur B – føroyskt 9. floksstig
- Synopsuoyðiblað – próvtøkuháttur B – føroyskt 9. floksstig
- Leistur – próvtøkugrundarlag
- Leistur – eftirmeting og afturboðan
- Leistur – ársætlan fyri lærugrein
- Leistur – undirvísingargongd

## Tímatal

Undirvísingin á 7., 8. og 9. floksstigi fevnir vanliga um fimm undirvísingartímar um vikuna øll trý árini.

# Innihaldsyvirlit

1. Samleiki ... 3
2. Kjarnaøki ... 3
2.1. Talaða málið ... 4
2.2. Skrivaða málið ... 5
2.3. Málkunnleiki ... 5
3. Førleikar ... 6
3.1. Faklig førleikamál – 9. floksstig ... 6
3.2. Støðisførleikar ... 9
4. Eftirmeting og próvtøka ... 10
4.1. Eftirmeting og afturboðan ... 10
4.2. Støðumet, ársmet og royndarmet ... 11
4.3. Skrivlig próvtøka á 9. floksstigi ... 11
4.3.1. Dømingargrundarlag – skrivlig próvtøka á 9. floksstigi ... 12
4.3.2. Próvtalslýsing – framseting á 9. floksstigi ... 12
4.4. Munnlig próvtøka á 9. floksstigi ... 13
4.4.1. Próvtøkuháttur A á 9. floksstigi ... 13
4.4.2. Próvtøkuháttur B á 9. floksstigi ... 16
4. Ársætlan og undirvísingargongdir ... 20

# 1. Samleiki

*Lærugreinin føroyskt tekur støði í næminginum í síni heild, varðar um vitbornu evnini eins og tey kensluligu og sosialu. Lærugreinin er høvuðsamboð í føroyskum skúlaskapi og er miðdepil í søgu- og nútíðarhøpi, eins og í føroyskum og altjóða samanhangi.*

*Við at síggja móðurmálið og mentanina í einum søguligum og tjóðarligum høpi fær næmingurin innlit í og verður tilvitaður um føroyska samfelagið. Lærugreinin føroyskt í alheimshøpi er við til at menna albúgving, mentanarfatan, tolsemi og virðing fyri fólki úr øðrum mentanum.*

*Kjarnin í lærugreinini byggir á eitt breitt úrval av føroyskum tekstum, bæði munnligum, skrivligum og marghháttaðum, har samspæl er millum skrift, ljóð og mynd.*

*Føroyskt 1-A*

Lærugreinin føroyskt er bæði albúgvandi og samleikamennandi. Lærugreinin skal geva næmingunum atgongd til tekstir og tekstsløg, sum eru partur av mentanini, og skal virka fyri, at næmingarnir menna eitt mál, sum ger tey før fyri at hugsa skilvíst, samskifta og læra.

Næmingarnir skulu í lærugreinini føroyskum fáa høvi at lesa tekstir, sum bjóða av, hugfanga tey, fáa tey at undrast, og sum geva teimum innlit í egin og heimlig viðurskifti, men sum eisini geva teimum útsýni at skilja menniskju, sum liva undir øðrum korum.

Lærugreinin skal eisini virka fyri, at næmingarnir fáa hollan førleika at nýta málið rætt, neyvt, fjølbroytt, og skapandi bæði munnliga og skrivliga.

Samleikin hjá næmingunum er sostatt aðaltáttur í lærugreinini, og lærugreinin er við til at brynja tey til at virka í einum nútíðarligum, fólkaræðiligum, talgildum og altjóðavendum føroyskum samfelag.

# 2. Kjarnaøki

*Lærugreinin føroyskt hevur trý ymisk kjarnaøki, ið eru tey somu frá lægsta til hægsta stig. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.*

- *Talaða málið*
- *Skrivaða málið*
- *Málkunnleiki*

*Føroyskt 1-A*

Kjarnin í lærugreinini føroyskum er føroyskt mál og føroyskir tekstir við støði í víðkaða teksthugtakinum, sum fevnir um øll sløg av tekstum. Teksthugtakið fevnir sostatt bæði um siðbundin fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg og um film, ljóð, myndir, heimasíður og aðrar marghháttaðar tekstir.

Kjarnaøkini umskarast, soleiðis at skilja, at flestu tekstir og arbeiðshættir hava eyðkenni frá meira enn einum kjarnaøki. Tískil verður fyri tað mesta arbeitt á fleiri kjarnaøkjum samstundis, hóast denturin kann liggja á ávísum kjarnaøki.

Mælt verður til, at næmingarnir í føroyskum á 7. floksstigi til samans lesa tað, sum svarar til umleið 100 síður av tekstum, herímillum eisini margháttaðum tekstum, og at næmingarnir í føroyskum á 8-9. floksstigi til samans lesa tað, sum svarar til umleið 300 síður av tekstum, herímillum eisini margháttaðum tekstum. Síðutalið er leiðbeinandi, soleiðis at skilja, at tað ikki er ætlanin, at lærarar skulu telja allar síður. Síðutalið er í sjálvum sær ikki avgerandi fyri, hvussu nógv tíð verður brúkt til undirvísing og arbeiði við ymsu tekstunum, og rúm skal eisini vera fyri at arbeiða við margháttaðum tekstum, sum ikki hava síðutøl.

Umframt hesar til samans umleið 400 síðurnar verður mælt til, at næmingarnir lesa:

- Í 7. flokki í minsta lagi eina (ungdóms)skaldsøgu.
- Í 8.-9. flokki til samans í minsta lagi tvær skaldsøgur, har í minsta lagi onnur skal vera upprunaføroysk. Ella í minsta lagi eina skaldsøgu og í minsta lagi eitt útgivið savn við styttri tekstum (yrkingasavn, stuttsøgusavn ella líknandi) ella eitt leikrit.

Tekstir, sum verða lisnir í lærugreinini føroyskum, eiga at vera á føroyskum máli. Flestu tekstirnir eiga at vera upprunaføroyskir, men týddir tekstir kunnu eisini verða lisnir. Tekstir á norðurlendskum málum eiga at verða lisnir í sambandi við undirvísing í norðurlendskum málum.

Margháttaðir tekstir, t.d. filmar, eiga eisini í størst møguligan mun at vera á føroyskum máli.

At lesa nógv mennir bæði lesi- og skriviførleikar. Umframt vavið á tekstum, sum er nevnt omanfyri, eigur undirvísingin at eggja næmingunum til at lesa framíhjá. Hetta kann gerast t.d. í samstarvi við bókasavnið á skúlanum.

## 2.1. Talaða málið

*Kjarnaøkið talaða málið snýr seg um at tosa, at lurta, at skilja og at rannsaka talaða føroyska málið. At samskifta væl og skiljandi og at lurta eru avgerandi sosialir og mentanarligir førleikar. Støðan, samskift verður í, skapar karm um samskiftisháttin. Undirvísingin skal tí fevna um ymisk munnlig tekstsløg og margháttað tekstsløg, sum hvørt á sín hátt skulu styrkja fatanina av ymsum munnligum samskiftisháttum og av leiklutum teirra samskiftandi.*

*Føroyskt 1-A*

Talaða málið fevnir bæði um at viðgera talað mál, so sum kjak, røður og poddvarp og um at samskifta munnliga og halda munnligar framløgur.

Munnligu tekstirnir skulu viðgerast við viðkomandi háttalagi, og næmingarnir skulu eisini sjálvir skapa munnligar tekstir, so sum ljóðbrot, filmsbrot og munnligar framløgur.

Føroyska sangmentanin er eisini ein natúrligur partur av talaða málinum. Málslig dygd og fjølbroytni í føroysku sangsiðvenjuni kunnu vera við til at víðka um málsligu tilvitanina, menna samleikan og styrkja felagsskapin.

# 2.2. Skrivaða málið

*Kjarnaøkið skrivaða málið snýr seg um at lesa og skriva føroyskt. At lesa og skriva eru javnskipaðar læritilgongdir, har næmingurin mennir skriviførleikan við at lesa og lesiførleikan við at skriva. Hugur næminganna at lesa og skriva skal stimbrast og somuleiðis tilvitan teirra um lesi- og skrivitilgongdina. Undirvísingin skal fevna um eitt fjølbroytt úrval av ymiskum fagur- og yrkisbókmentaligum tekstsløgum, herímillum eisini margháttaðum tekstsløgum.*

*Føroyskt 1-A*

Skrivaða málið fevnir bæði um at lesa tekstir og at skapa tekstir. Lisna tekstúrvalið skal fevna um eitt breitt úrval av fagur- og yrkisbókmentaligum tekstum umboðandi ymisk tekstsløg, so sum skaldsøgur, stuttsøgur, yrkingar, kvæði, sagnir, ævintýr, greinir og kjaktekstir. Dømi um marghátttað tekstsløg eru myndir, lýsingarfilmar, tíðindasendingar, poddvarp, bloggar, filmar (heimildarfilmar, spælifilmar og stuttfilmar), teknirøðir, grafiskar skaldsøgur, myndabøkur o.a. Tekstirnir eiga at umboða ymisk tíðarskeið, men høvuðsdentur eigur at vera á nýggjari tekstum.

Tekstirnir skulu viðgerast við viðkomandi háttalagi, men dentur eigur eisini at vera á lesiupplivingina. Næmingarnir skulu eisini sjálvir skapa tekstir, bæði skrivligar og marghátttaðar.

# 2.3. Málkunnleiki

*Kjarnaøkið málkunnleiki fevnir um føroyska málláru og málsøgu. Næmingarnir fáa innlit í málið sum skipan og tilknýti tess til mentan og samleika. Undirvísingin skal fevna um málláru á støðugt hækkandi torleikastigi, føroyska málsøgu og norðurlendska málfelagsskapin.*

*Føroyskt 1-A*

Arbeiðast skal við málláru og mállæruhugtøkum, soleiðis at næmingarnir ogna sær førleikar at samskifta munnliga og skrivliga á røttum, greiðum, neyvum og fjølbroyttum føroyskum máli. Í hesum sambandi skal eisini arbeiðast við málsligari variatión og stíllegum.

Næmingarnir eiga at fáa yvirskipaða kunning um norðurlendska málskyldskapin og føroysku skriftmálstilgongdina. Næmingarnir eiga at lurta eftir og lesa tekstir á norðurlendskum málum, serliga norskum og íslendskum í sambandi við undirvísing í norðurlendsku grannamálunum. Viðvíkjandi norðurlendskum málum er talan um málini av germanskum uppruna: íslendskt, norskt (bókmál og nýnorskt), svenskt og danskt.

Næmingarnir eiga at arbeiða við málsligari variatión so sum ymiskum stíllegum, málførum og bólkamálførum (sosiolektum).

# 3. Førleikar

## 3.1. Faklig førleikamál – 9. floksstig

Fakligu førleikamálini eru orðað eftir besta próvtali soleiðis at skilja, at um næmingurin hevur ognað sær førleikamálini væl og virðiliga fær hann/hon próvtalið 12. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

- *at orða seg málsliga rætt, greitt, neyvt og fjølbroytt, bæði skrivliga og munnliga*

*Føroyskt 1-A*

Føroyskt mál og málnýtsla eru støðugt í broyting, og tí ber neyvan til at gera eina fullfíggjaða lýsing av rættari, greiðari, neyvari og fjølbroyttari málnýtslu. Endamálið og samskiftisstøðan hava eisini ávirkan á málnýtsluna, og umráðandi er tí altíð at hava hesi í huga, tá ið metast skal um málnýtslu.

At læra at orða seg væl og neyvt, eins og lýst omanfyri, krevur, at næmingarnir arbeiða nógv og miðvíst við málinum, bæði munnliga og skrivliga. Við at lesa nógvar og fjølbroyttar tekstir økist orðfeingið, eins og næmingarnir læra orð- og setningsmyndir, sum hjálpa teimum við stavseting og orðalagi. Venjingar, bæði munnligar og skrivligar, eru eisini neyðugar fyri at kunna røkka málinum.

Skrivliga eiga næmingarnir at orða seg rætt á føroyskum sambært teimum stavsetingar- og mállærureglum, sum eru galdandi. Í talumáli eru fleiri variatiónir, so sum staðbundnir málføramunir og samanfall av ymsum bendingum. Tó eiga næmingarnir, eisini í munnligum samskifti, at leggja seg eftir at málbera seg rætt, greitt, neyvt og fjølbroytt. Atlit skal tó takast at ymsu málførunum hjá næmingunum.

- *at nýta viðkomandi samskiftishættir og grundgevingarhættir eftir endamáli og samskiftisstøðu*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at gerast tilvitaðir um viðurskiftini millum sendara, móttakara, miðil og innihald í samskiftisstøðuni. Slík tilvitan styrkir førleikan at velja viðkomandi hættir at samskifta og grundgeva, bæði munnliga og skrivliga. Undirvísingin eigur eisini at fevna um samskifti á talgildum pallum, herímillum á sosialum miðlum.

- *at nýta viðkomandi framløguhættir eftir evni og endamáli*

*Føroyskt 1-A*

At leggja fram er grundleggjandi førleiki í lærugreinini føroyskum, sum skal styrkjast og venjast regluliga. Næmingarnir eiga bæði einsæris og í bólkum at skipa framløgur av ymsum slag. Talan kann eitt nú vera um munnligar framløgur fyri flokkinum ella í bólkum og at skapa ymsar margháttaðar framløgutekstir.

- *at nýta viðkomandi lesisnildir eftir lesiendamáli*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at gerast tilvitaðir um ymsar lesisnildir, soleiðis at tey gerast før fyri at lesa eftir lesiendamáli. Dømi um lesisnildir eru: yvirlitslesing, snarlesing, nærlesing og punktlesing. Tað er í

hesum sambandi umráðandi, at lesiendamálið verður lýst, og at undirvísingin eisini verður skipað soleiðis, at lesiendamálið er ymiskt. Dømi um lesiendamál kunnu vera: fáa vitan, greina og tulka, svara fakligum spurningum, skriva um tekstin, uppliva lesigleði, víðka um orðfeingið, menna málsligar førleikar o.s.fr.

Upplestur økir eisini um lesiførleikarnar, og næmingarnir eiga javnan at lesa upp. Í upplestrinum eigur dentur m.a. at verða lagdur á framburð, lesiferð og hóskandi áherðslu.

- *at greina, tulka og seta í frásjón ymisk fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at fáa kunnleika um ymisk amboð at greina og tulka fagur- og yrkisbókmentaligar tekstir. Fagurbókmentalig greiningaramboð fevna eitt nú um tekstslag, frásagnarviðurskifti, bygging, persónslýsingar, umhvørvislýsingar og huglag. Yrkisbókmentalig greiningaramboð fevna eitt nú um grundgevingar, málnýtslu og viðurskiftini millum sendara, móttakara, miðil og innihald. Viðvíkjandi margháttaðum tekstum skulu visuellu og ljóðligu viðurskiftini eisini viðgerast eitt nú við myndagreining, sambandi millum mynd og tekst og filmsgreining. Tekstirnir kunnu eisini setast í t.d samfelagsligt ella tíðarligt høpi.

- *at velja og nýta viðkomandi skrivisnildir at skriva og skapa ymisk viðkomandi tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg*

*Føroyskt 1-A*

At málbera seg skrivliga er týðandi førleiki, sum næmingarnir støðugt skulu venja. Lesing og skriving hanga saman, soleiðis at skilja, at næmingarnir við at skriva ymisk tekstsløg eisini læra betur at lesa og skilja tekstsløgini. Skilagott er tí at lata næmingarnar royna seg við at skriva smáar tekstir ella tekstbrot í teimum tekstsløgum, sum arbeitt verður við. At skriva er eisini at skipa hugsan, og tí læra næmingarnir við at skriva eisini at grundgeva og samskifta greidliga.

Við menningini av vitlíki (AI) og øðrum hjálparamboðum gerst arbeiðsgongdin í sambandi við skriving enn meira týdningarmikil. Í undirvísingini eigur tí størri dentur at verða lagdur á arbeiðsgongdina enn á endaliga avrikið. Vitlíki kann vera eitt hent hjálparamboð og eigur at verða tikið við í undirvísingina. Næmingarnir kunnu eitt nú brúka vitlíki til at leita eftir upplýsingum og viðgera hesar kritiskt. Eisini kunnu tey kritiskt viðgera tekstir, sum eru gjørdir við vitlíki og t.d. samanbera við aðrar líknandi tekstir.

- *at skriva tekst sjálvstøðugt og málsliga rætt við fjølbroyttum orðalagi*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at venja seg við, at tað krevur fyrireiking og tekur tíð at skriva tekst: at fáa hugskot og leggja til rættis, at skriva kladdu, taka afturíaftur og bøta um, rættlesa, leggja fram ella lata inn og eftirmeta. Eisini er umráðandi at hugsa um, hvat tekstslag, skrivað verður.

- *at nýta orðalistar og orðabøkur sum hjálparmiðlar til stavseting og rætta málnýtslu*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir skulu læra at nýta orðabøkur og duga at brúka teir møguleikar, sum eru at finna í teimum, herímillum at finna bendingarmynstur.

- *at vísa til og endurgeva keldur á rættan hátt*

*Føroyskt 1-A*

Í sambandi við fakligt arbeiði skulu næmingarnir læra at arbeiða við keldum og keldukritikki, herímillum eisini við upphavsrætti og samtykki. Næmingarnir skulu læra at leita eftir keldum, bæði á netinum og á bókasøvnum, at meta um hesar og vísa til tær á rættan hátt.

- *kritiskt og við umhugsni at velja og nýta viðkomandi tíðarbærar miðlar*

*Føroyskt 1-A*

Miðlalandslagið er støðugt í broyting, og nýggir miðlar koma javnan undan kavi. Næmingarnir eiga at verða tilvitaðir um miðlanýtslu og kritiskt taka støðu til innihald og miðlan í ymsum miðlum, herímillum eisini sosialum miðlum.

- *málllæru, herímillum stavseting, teknseting, bendingarlæru og orðalagslæru*

*Føroyskt 1-A*

Málllæruundirvísingin hevur til endamáls, at næmingarnir duga málllærureglurnar so mikið væl, at tey við at brúka tær megna at skriva rætt, greitt og neyvt. Næmingarnir eiga at læra føroysku málllæruheitini, men mælt verður til eisini at læra latínsku málllæruheitini.

- *at vísa kunnleika um málsliga variatión, herímillum staðbundnan málføramun*

*Føroyskt 1-A*

Umframt at vera samskiftismiðil er málið eisini mentanarberandi og samleikaskapandi, og næmingarnir eiga at vera tilvitaðir um málsliga variatión og ymsar stíllegur. Tey eiga at hava kunnleika um eitt nú staðbundna og aldurstreytaða málvariatión. Somuleiðis eiga tey at hava kunnleika um ymsar stíllegur, eitt nú formligt og óformligt mál.

- *at vísa kunnleika um føroyska málsøgu*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at fáa yvirskipaðan kunnleika um føroyska málsøgu, herímillum málskyldskapin við norðurlendsku málini danskt, svenskt, norskt og íslendskt.

- *at vísa kunnleika um norðurlendsk mál, serliga norskt og íslendskt, bæði í talu og á skrift*

*Føroyskt 1-A*

Talan er um norðurlendsku málini av germanskum uppruna. Í sambandi við undirvísing í norðurlendskum málum eiga næmingarnir at lesa nakrar tekstir á norðurlendsku málunum, serliga íslendskum og norskum (bókmáli og nýnorskum). Til ber at lesa tekstir, sum eru týddir millum málini, og soleiðis bera saman líkleikar og frábrigdi. Somuleiðis eiga næmingarnir at lurta eftir norðurlendsku málunum við t.d. at lurta eftir upplestri, síggja filmar og hoyra ljóðbrot.

# 3.2. Støðisførleikar

- *Lesing*
- *Skriving*
- *Munnligt samskifti*

*Støðisnámsætlan*

Lesing, skriving og munnligt samskifti eru grundleggjandi førleikar í føroyskum, sum eru væl lýstir í pørtunum um kjarnaøki og faklig førleikamál.

*Kt-førleikar og talgildisbúgving snúgva seg bæði um førleikar at brúka ítøkilig, viðkomandi kt-amboð og at skilja amboðini, og í hvørjum samanhangi tey skynsamt kunnu nýtast. Eisini snúgva kt-førleikar og talgildisbúgving seg um atferð á talgildum miðlum og keldukritiska viðgerð av talgildum tilfari. Endamálið er at búgva næmingarnar til at vera virknar, sjálvstøðugar, kritiskar og fólkaræðisligar borgarar í einum talgildum samfelag.*

- *Nýtsla*
- *Fatan og teldulig hugsan*
- *Metingarevni*

*Støðisnámsætlan*

Av viðkomandi kt-amboðum í lærugreinini føroyskum kunnu nevnast forrit til at skapa og viðgera tekstir, herímillum eisini margháttaðar tekstir, framløguforrit, samskiftis- og samstarvsforrit, rættstavari, talgildar orðabøkur, leitiskipanir o.s.fr. Næmingarnir eiga eisini at fáa innlit í kt-amboð við vitlíki (AI) og møguleikar og avmarkingar við vitlíki. Kt-amboð við vitlíki kunnu nýtast skilagott og viðkomandi til eitt nú at finna upplýsingar og til at fáa íblástur og hugskot.

Umráðandi er, at næmingarnir fata kt-amboðini sum nýtsluamboð og lata føroyskfakliga evnið, sum arbeitt verður við, verða ráðandi, tá ið ávísa kt-amboðið skal veljast. Við regluliga at nýta kt-amboð til at loysa ymsar uppgávur læra næmingarnir av egnum royndum fyrimunir og vansar við at nýta ymisk kt-amboð í lærugreinini føroyskum.

- *Samskifti og samstarv*

*Støðisnámsætlan*

Samskifti, bæði munnligt og skrivligt, fyllir nógv í lærugreinini føroyskum, eins og tað fyllir nógv í gerandisdegnum hjá næmingunum. Grundleggjandi fyri alt gott samskifti er, at viðurskiftini millum sendara, móttakara, miðil og innihald eru í lagi. Í munnligum samskifti nýta vit okkara sansir at meta um hesi viðurskiftini. Á skrift og í samskifti á netinum eru vit, bæði sum sendarar og móttakarar, meira avmarkað, og tað kann stundum vera trupult at meta um viðurskiftini millum sendara, móttakara, miðil og innihald. Í lærugreinini føroyskum eigur at vera arbeitt miðvíst at økja um tilvitan næminganna um leiklutir teirra samskiftandi, eisini á netinum.

Tøknin og talgildir miðlar geva møguleikar fyri samstarvi, sum ikki er knýtt at tíð og stað og atgongd á sama hátt, sum vanligt hevur verið við samstarvi. Næmingar kunnu sita á hvør sínum stað, men hóast tað arbeiða á sama talgilda palli samstundis. Eisini kunnu næmingar hava javnbjóðis atgongd

og rætt til tilfarið og arbeiðið, t.d. kunnu tey samstundis skriva í sama skjal. Í lærugreinini føroyskum eiga næmingarnir at samstarva á ymsar hættir, eisini á talgildum pallum.

- *Leitan og viðgerð*
- *Skapan*

*Stoðisnámsætlan*

Í lærugreinini føroyskum skulu næmingarnir arbeiða við at skapa tekstir, bæði munnligar, skrivligar og margháttaðar. Í hesum sambandi kann eisini arbeiðast við at lata næmingar finna sær fakligar upplýsingar í ymsum talgildum leitigrunnum og læra at meta keldukritiskt um hesar.

# 4. Eftirmeting og próvtøka

## 4.1. Eftirmeting og afturboðan

*Aðalmálið við allari undirvísing í øllum skúlaverkinum er, at allir næmingar áhaldandi læra og mennast, og tí eru reglulig eftirmeting og afturboðan um úrtøku og menning næminganna sameindur partur av allari undirvísing í øllum lærugreinum og á øllum stigum í skúlaverkinum.*

*Í hesum sambandi er tað týdningarmikið, at skúlaverkið strembar eftir at skapa eitt trygt og mennandi undirvísingarumhvørvi, har undirvísingin er fjøltáttað og væl skipað við dygdargóðum fakligum innihaldi og háttaløgum. Harumframt er tað týdningarmikið, at undirvísingin hevur ítøkilig mál, so næmingarnir vita, hvat uppgávurnar fevna um, og hvat væntað verður av teimum.*

*Eftirmeting av úrtøkuni gevur bara meining, um hon verður fylgd upp av ítøkiligari afturboðan, sum tekur saman um núverandi støðu, heildarúrtøku og menning næminganna. Lærararnir skulu tí hava innlit í úrtøku, arbeiðslag og ídni hjá næmingunum í læritilgongdini.*

*Afturboðanin til næmingarnar skal leggja dent á næsta stig í tilgongdini og undirvísingina frameftir. Fyri næmingarnar snýr tað seg um, hvussu tey kunnu menna úrtøku og hegni, umframt hvussu tey kunnu tillaga ella møguliga bøta um arbeiðslag og avrik. Fyri lærararnar snýr afturboðan seg um at tillaga undirvísingina við støði í vitan um næmingaúrtøku, undirvísingargongdir, háttaløg o.a.*

*Eftirmetingin skal saman við afturboðan leggja áherðslu á læri- og menningartilgongdina heldur enn á sjálvt úrslitið. Endamálið er at eggja og stuðla næmingunum í áhaldandi at vilja læra og menna fakligu, persónligu og sosialu fortreytirnar.*

*Stoðisnámsætlan*

Næmingarnir skulu javnan fáa afturboðan og leiðbeining í sínum arbeiði. Hetta kann eitt nú gerast við javnan at vísa á førleikamálini og at vísa á hóskandi hjálparmiðlar og arbeiðshættir, sum næmingarnir kunnu fáa gagn av. Afturboðanin kann vera munnlig ella skrivlig. Víst verður til leiðbeinandi skjalið ”Leistur – eftirmeting og afturboðan”, sum lærarar kunnu styðja seg til.

Umráðandi er, at lærarin leggur undirvísingina soleiðis til rættis, at næmingarnir fáa bestu fortreytir at læra. Tískil eiga undirvísingargongdir altíð at eftirmetast við tí fyri eyga at betra um undirvísingina.

Víst verður til skjalið “Leistur – undirvísingargongd”.

## 4.2. Støðumet, ársmet og royndarmet

Á 8. og 9. floksstigi skulu næmingarnir gjøgnum skúlaárið hava støðumet og ársmet eftir galdandi próvtalsstiga. Vanliga fáa næmingarnir støðumet fyri jólafrítíðina og fyri páskafrítíðina og so ársmet við skúlaárslok. Í sambandi við royndir fáa næmingarnir vanliga eisini royndarmet.

Metini verða givin við støði í fakligu førleikamálunum og støðisførleikunum. Støðu- og ársmetini eru sostatt meting lærarans av, í hvønn mun næmingarnir í framdum avrikum lúka sett førleikamál, samanborið við framda undirvísing. Royndarmetini verða givin við støði í ávísum uppgávuorðingum.

Støðu- og ársmetini skulu lýsa fakliga støðið í løtuni, tá ið metini verða givin. Talan eigur sostatt ikki at vera um eina meting yvir eitt longri tíðarskeið ella eitt miðal av fleiri avrikum.

Atburður, uppmøting og arbeiðssemi eiga í sjálvum sær ikki at vera tikin við í støðu- og ársmetini.

Ársmetini á 9. floksstigi eru endalig og verða sett í prógv næminganna.

## 4.3. Skrivlig próvtøka á 9. floksstigi

*Skrivligu próvtøkurnar eru í tveimum. Ein partur fevnir um stavseting, málløru og lesing og ein partur fevnir um framseting.*

***Stavseting, mállæra og lesing – skrivlig próvtøka á 9. floksstigi***

*Hesin parturin av skrivligu próvtøkunum er tvíbýttur og varir til samans 11/2 tíma. Allir hjálparmiðlar eru loyvdir. Í stavseting og málløru eru smáar uppgávur í stavseting, teknseting, bendingarløru og orðalagsløru. Í uppgávuraðnum til lesing er hóskandi nøgd av tekstum umboðandi ymisk tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg. Til tekstirnar eru spurningar, sum próvtakarin skal svara.*

***Framseting – skrivlig próvtøka á 9. floksstigi***

*Hesin parturin av próvtøkuni varir 3½ tíma. Allir hjálparmiðlar eru loyvdir. Próvtakarin skal við støði í einum ella fleiri tekstum sjálvstøðugt skriva ein tekst.*

*Próvtøkutilfarið fevnir um avmarkaða nøgd av tekstum í hóskandi vavi við 4-5 uppgávum, harav próvtakarin svarar einari uppgávu. Tekstúrvalið fevnir um ymisk fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg.*

*Føroyskt 1-A*

Uppgávurnar í framsetingini fevna um at skriva ein tekst við støði í eini uppgávuorðing. Longdin á avrikinum er ikki ásett í uppgávuni, men mælt verður til at lata tekstin fevna um 1½-3 síður á 2.400 sløg.

Hjálparmiðlar eru t.d. undirvísingartilfar, orðabøkur, rættstavari og annað viðkomandi tilfar. Avrikini, sum próvtakarin letur inn, skulu vera egin avrik, og tí hevur próvtakarin ikki loyvi at nýta vitlíki (AI) ella at samskifta við onnur enn umsjónarfólk, meðan próvtøkurnar eru.

### 4.3.1. Dømingargrundarlag – skrivlig próvtøka á 9. floksstigi

*Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Dentur verður sum heild lagdur á, hvussu próvtakarin megnar at loysa settu uppgávurnar, viðgera próvtøkutilfarið, skipa tekstin í framsetingini og nýta føroyskfakliga vitan og háttaløg í lærugreinini. Eisini verður dentur lagdur á, hvussu rætt og greitt próvtakarin megnar at orða seg á føroyskum máli.*

*Eitt próvtal verður givið fyri lesing, og eitt próvtal verður givið fyri stavseting og málløru, har hvør parturin telur ½.*

*Fyri framseting verður eitt próvtal givið við støði í einari heildarmeting av avriki próvtakarans.*
*Føroyskt 1-A*

Dømingin í framseting er ein heildarmeting, har hugt verður eftir, hvussu próvtakari megnar at svara valdu uppgávuni. Eisini verður hugt eftir, hvussu próvtakarin dugir at skipa tilfarið og megnar at orða seg á føroyskum máli sambært teimum stavsetingar- og mállærureglum, sum eru galdandi.

Víst verður til skjalið ”Metingarark – skrivlig próvtøka – føroyskt 9. floksstig”.

### 4.3.2. Próvtalslýsing – framseting á 9. floksstigi

| Próvtal | Heiti | Lýsing |
|---|---|---|
| **12** | Framúr gott | Málburðurin er sera góður, fjølbroyttur og neyvur við ongum ella bert fáum týdningarleysum villum. Próvtakarin er kunnigur við tekstslag, heldur seg til evnið og byggir avrikið skilvíst upp. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur sera gott tak á háttalagi og dugir sera væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. Onkur smávegis, men týdningarleys lýti kunnu koma fyri. |
| **10** | Sera gott | Málburðurin er góður, fjølbroyttur og neyvur, tó við nøkrum villum. Próvtakarin er kunnigur við tekstslag, heldur seg til evnið og byggir avrikið skilvíst upp. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur gott tak á háttalagi og dugir væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. Onkur smávegis lýti kunnu koma fyri. |
| **7** | Gott | Málburðurin er sum heild góður, fjølbroyttur og neyvur, tó við fleiri villum. Próvtakarin er sum heild kunnigur við tekstslag, heldur seg rímiliga væl til evnið og byggir avrikið skilvíst upp. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur rímiliga gott tak á háttalagi og dugir rímiliga væl at nýta |

| | | |
|---|---|---|
| | | vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. Onkur lýti kunnu koma fyri. |
| **4** | Hampiligt | Málburðurin er rímiliga góður og neyvur, tó við fleiri villum. Próvtakarin er rímiliga kunnigur við tekstslag, men viðger tað trilvandi, og avrikið er sum heild ikki bygt væl upp. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi og dugir sum heild at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar tó illa at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. Onkur stór lýti kunnu koma fyri. |
| **02** | Nøktandi | Málburðurin er heldur veikur við fleiri grovum villum. Próvtakarin hevur ivasaman kunnleika um tekstslag, viðger tað trilvandi, men tó nøktandi, og avrikið er illa bygt upp. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi, men megnar sum heild illa at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild ikki at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. Stór lýti koma fyri. |
| **00** | Ikki nøktandi | Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur fakligu málini í lærugreinini. |
| **-3** | Heilt vánaligt | Verður givið fyri heilt vánaligt avrik, ið als ikki stendur mát og als ikki lýkur fakligu málini í lærugreinini. |

# 4.4. Munnlig próvtøka á 9. floksstigi

## 4.4.1. Próvtøkuháttur A á 9. floksstigi

*Próvtøkuháttur A er ein munnlig próvtøka í framseting, tekstførleika og upplestri.*

*Próvhoyringin varir umleið 20 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er umleið 40 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.*

*Próvtøkuspurningarnir verða settir við støði í einum úrvali av lisnum tekstum, sum hava verið viðgjørdir í 8. og 9. flokki. Úrvalið av lisnum tekstum, ið er próvtøkugrundarlag undir munnligu próvtøkuni, fevnir um 80-100 normalsíður ella samsvarandi av styttri tekstum, sum fevna um eitt breitt úrval av fagur- og yrkisbókmentaligum tekstsløgum, herímillum eisini margháttaðum tekstsløgum. Harumframt verða til próvtøku givin upp tvey lisin bókmentaverk, t.d. skaldsøga, yrkingasavn, langt kvæði ella leikrit ella yrkisbókmentaverk. Í minsta lagi annað av verkunum skal vera upprunaføroyskt.*

*Próvtakarin verður próvhoyrdur í ólisnum tilfari, sum kann fevna um styttri tekstir, brot úr størri verkum ella annað tilfar í hóskandi vavi. Í síni heild skal ólisna tilfarið umboða eitt breitt úrval av fagur- og yrkisbókmentaligum tekstsløgum, herímillum eisini margháttaðum tekstsløgum. Ólisna*

*tilfarið, sum skal vera umleið tríggjar normalsíður ella samsvarandi, skal viðgerast við viðkomandi háttalagi og sjálvstøðugt setast í frásjón og í samband við lisið tilfar. Ein partur av ólisna tilfarinum, svarandi til umleið ¼ normalsíðu, skal verða markaður til upplestur. Er ólisna tilfarið annað tekstslag enn skrivaður tekstur, fær próvtakarin annað tekstbrot, svarandi til umleið ¼ normalsíðu, at lesa upp.*

*Undir próvhoyringini leggur próvtakarin fyri við upplestri og framløgu við støði í próvtøkuspurninginum, sum próvtakarin hevur arbeitt við í fyrireikingartíðini. Restin av próvhoyringini er ein faklig samrøða millum próvtakara og próvhoyrara við støði í próvtøkuspurninginum og framløgu próvtakarans.*

*Sami próvtøkuspurningur kann í mesta lagi verða nýttur tvær ferðir í sama flokki/bólki.*

*Føroyskt 1-A*

Próvhoyrarin ger próvtøkuspurningarnar, sum skulu sendast próvdómara í seinasta lagi sjey dagar undan próvtøkuni. Einstaki próvtakarin skal hava í minsta lagi fýra próvtøkuspurningar at velja í. Sami próvtøkuspurningur kann verða nýttur tvær ferðir. Próvtøkuspurningarnir skulu breitt umboða tey førleikamál, sum eru ásett í námsætlanini.

Í próvtøkuspurninginum skal greitt koma fram, at próvtakarin við viðkomandi háttalagi skal viðgera ólisna tilfarið og seta í frásjón og í samband við lisið tilfar frá 8. og 9. fl. Leiðbeinandi spurningar, sum t.d. at biðja próvtakaran leggja dent á nakað ávíst í viðgerðini ella í frásjónargerðini, kunnu vera. Somuleiðis ber til at vísa á ávíst lisið tilfar at seta í samband við. Havast má tá í huga, at leiðbeinandi spurningar ávirka torleikastigið á próvtøkuspurninginum og harvið eisini heildarmetingina av avrikinum hjá próvtakaranum.

Ólisna tilfarið skal umboða ymisk fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg. Tekstirnir eiga eisini at umboða ymisk tíðarskeið. Viðkomandi upplýsingar, so sum høvundur, møguligur týðari, heiti og útgávuár skulu fylgja við ólisnu tekstunum.

Víst verður til skjalið: “Leiðbeining – próvtøkuspurningur – próvtøkuháttur A – føroyskt 9. floksstig”.

Tíðin, ið próvtakarin nýtir til framløguna er ikki bindandi soleiðis at skilja, at um próvhoyrarin metir, at próvtakaranum tørvar longri ella styttri tíð, kann fakligi samrøðuparturin styttast ella leingjast tilsvarandi. Havandi í huga, at fyrireikingartíðin er 40 min., er munur á, í hvønn mun próvtakarin kann fara í dýpdina við tekstinum samanborið við próvtøkuhátt B.

### 4.4.1.1. Dømingargrundarlag - próvtøkuháttur A á 9. floksstigi

*Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í einari fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt og við neyvum og fjølbroyttum máli at leggja fram og viðgera tilfar við støði í einum próvtøkuspurningi. Hann/hon skal sýna, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum, seta teir í samband við tættir í undirvísingini og seta próvtøkutilfarið í frásjón. Próvtakarin skal duga at nýta føroyskfakliga vitan og faklig háttaløg í lærugreinini. Eisini verður dentur lagdur á, at próvtakarin*

*er virkin í fakligu samrøðuni. Í upplestrinum verður dentur lagdur á, at próvtakarin lesur raðið og týðiliga.*

*Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.*

*Føroyskt 1-A*

Dømingin er ein heildarmeting við støði í framløguni og í fakligu samrøðuni. Dentur skal leggjast á fakliga innihaldið, skipan av framløguni og á, hvussu væl próvtakarin orðar seg á føroyskum máli.

### 4.4.1.2. Próvtalslýsing – próvtøkuháttur A á 9. floksstigi

| Próvtal | Heiti | Lýsing |
|---|---|---|
| **12** | Framúr gott | Próvtakarin lesur raðið við týðiligum framburði og góðari lesiferð. Hann/hon vísir við tónalagi, áherðslu og natúrligum steðgum, at hann/hon hevur skilt tekstin til fulnar. Ongar ella bert týdningarleysar villur eru í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er sera greið og væl skipað. Málið í framløguni er fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er sera virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið tilfarið á góðan hátt, og viðgerðin er sera væl grundað við ongum ella bert fáum týdningarleysum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur gott tak á háttalagi og dugir sera væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **10** | Sera gott | Próvtakarin lesur raðið við týðiligum framburði og góðari lesiferð. Hann/hon vísir við tónalagi, áherðslu og natúrligum steðgum, at hann/hon hevur skilt tekstin til fulnar. Nakrar villur eru tó í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er greið og væl skipað. Málið í framløguni er sum heild fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið á góðan hátt, og viðgerðin er væl grundað, tó við nøkrum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur gott tak á háttalagi og dugir væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **7** | Gott | Próvtakarin lesur rímiliga raðið við rímiliga týðiligum framburði og góðari lesiferð. Hann/hon vísir so nøkulunda við tónalagi, áherðslu og natúrligum steðgum, at hann/hon hevur skilt tekstin. Fleiri villur eru tó í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er sum heild góð og rímiliga væl skipað. Málið í framløguni er rímiliga fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið heldur trilvandi, men viðgerðin er tó rímiliga væl grundað, tó við fleiri manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon |

| | | |
|---|---|---|
| | | hevur tak á háttalagi og dugir at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **4** | Hampiligt | Próvtakarin lesur rímiliga raðið við rímiliga týðiligum framburði og rímiligari lesiferð. Hann/hon vísir so nøkulunda við tónalagi, áherðslu og natúrligum steðgum, at hann/hon hevur skilt tekstin. Fleiri grovar villur eru tó í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er í lagi og rímiliga væl skipað. Málið í framløguni er í lagi, men ikki serliga fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er sum heild virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið trilvandi, men viðgerðin er tó rímiliga væl grundað, tó við fleiri stórum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon sum heild hevur tak á háttalagi og sum heild dugir at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar tó illa at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **02** | Nøktandi | Próvtakarin lesur ikki serliga raðið, men heldur orð fyri orð. Framburðurin er ikki serliga týðiligur, og hann/hon megnar so dánt at vísa, at tað lisna er skilt. Fleiri grovar villur eru í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er trilvandi og hongur ikki væl saman. Framløgan er skillig, men málsliga veik. Próvtakarin er ikki serliga virkin í fakligu samrøðuni. Viðgerðin er grunn og heldur illa skipað, tó er hon á einari leið. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi, men megnar sum heild illa at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild ikki at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **00** | Ikki nøktandi | Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur fakligu málini í lærugreinini. |
| **-3** | Heilt vánaligt | Verður givið fyri heilt vánaligt avrik, ið als ikki stendur mát og als ikki lýkur fakligu málini í lærugreinini. |

### 4.4.2. Próvtøkuháttur B á 9. floksstigi

*Próvtøkuháttur B er synopsupróvtøkuhátturin, har próvtakarin fer í dýpdina við evninum, áðrenn farið verður upp til munnliga próvtøku.*

*Próvtøkugrundarlagið verður skipað í hugdýpingarøki við støði í einum úrvali av lisnum tekstum, sum hava verið viðgjørdir í 8. og 9. flokki. Hvørt hugdýpingarøki fevnir um 4-6 tekstir ella tekstbrot í hóskandi vavi. Úrvalið av lisnum tekstum, ið er próvtøkugrundarlag undir munnligu próvtøkuni, fevnir um 80-100 normalsíður ella samsvarandi av styttri tekstum, sum fevna um eitt breitt úrval av fagur- og yrkisbókmentaligum tekstsløgum, herímillum eisini margháttaðum tekstsløgum.*

*Harumframt verða til próvtøku givin upp tvey lisin bókmentaverk, t.d. skaldsøga, yrkingasavn, langt kvæði ella leikrit ella yrkisbókmentaverk. Í minsta lagi annað av verkunum skal vera upprunaføroyskt.*

*Við støði í tillutaðum hugdýpingarøki skal próvtakarin í samráð við læraran í føroyskum velja ein ella fleiri ólisnar tekstir, sum í vavi fevna um 3-10 normalsíður ella samsvarandi, at viðgera og so skriva eina synopsu við støði í viðgerðini. Synopsan skal latast inn í seinasta lagi sjey yrkadagar fyri seinasta undirvísingardag. Próvtakararnir kunnu skriva synopsuna einsæris ella í bólkum við tveimum ella trimum próvtakarum. Próvtakararnir verða tó altíð próvhoyrdir munnliga hvør sær.*

*Munnliga próvtøkan varir umleið 24 minuttir, íroknað próvdøming. Eingin fyrireikingartíð er.*

*Próvhoyringin verður skipað við framløgu, upplestri og fakligari samrøðu millum próvtakara og próvhoyrara. At lesa upp velur próvtakarin eitt tekstbrot úr ólisna tilfarinum, svarandi til umleið ¼ normalsíðu. Er ólisna tilfarið annað tekstslag enn skrivaður tekstur, velur próvtakarin annað ólisið tekstbrot, svarandi til umleið ¼ normalsíðu, at lesa upp.*

*Undir próvhoyringini leggur próvtakarin fyri við upplestri og eini framløgu við støði í synopsuni. Restin av próvhoyringini er ein faklig samrøða millum próvtakara og próvhoyrara við støði í framløgu próvtakarans, synopsuni og tekstunum í hugdýpingarøkinum.*

*Føroyskt 1-A*

Ólisna tilfarið verður á einhvønn hátt sett í samanhang við lisnu tekstirnar í hugdýpingarøkinum.

Víst verður til skjalið: “Leiðbeining – próvtøkuháttur B – føroyskt á 9. floksstigi”.

### 4.4.2.1. Dømingargrundarlag - próvtøkuháttur B á 9. floksstigi

*Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í einari fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt og við neyvum og fjølbroyttum máli at leggja fram og viðgera tilfar við støði í eini synopsu. Hann/hon skal sýna, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum, seta teir í samband við hugdýpingarøkið og tættir í undirvísingini og seta próvtøkutilfarið í frásjón. Próvtakarin skal duga at nýta føroyskfakliga vitan og faklig háttaløg í lærugreinini. Eisini verður dentur lagdur á, at próvtakarin er virkin í fakligu samrøðuni. Í upplestrinum verður dentur lagdur á grundgeving próvtakarans fyri val av tekstbroti, og at hann/hon lesur raðið og týðiliga.*

*Í metingini av synopsu próvtakarans verður hugt eftir, hvussu væl synopsan er skipað, eitt nú við atliti at greidleika, innihaldi, málburði, keldulista, stav- og teknseting.*

*Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans, har synopsan telur umleið 1/4 og munnliga próvhoyringin og upplesturin umleið 3/4.*

*Føroyskt 1-A*

Í metingini verður hugt eftir, hvussu væl synopsan er skipað, eitt nú við atliti at greidleika, innihaldi, málburði, keldulista, stav- og teknseting, og eftir munnliga avrikinum.

Dentur verður lagdur á evni próvtakarans at tulka tekst, meta um hann og at seta hann í frásjón, umframt evnini at lýsa samspælið millum mál, innihald, tekstslag og høpi. Eisini verður hugt eftir greinandi førleikum próvtakarans í sambandi við bókmentir og onnur tekstsløg. Dentur verður lagdur

á greiðan málburð, fjølbroytta og trygga nýtslu av viðkomandi hugtøkum, at framløgan er samanhangandi, at upplesturin er greiður og flótandi og vísir persónligu fatan próvtakarans av tí lisna. Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.

#### 4.4.2.2. Próvtalslýsing – próvtøkuháttur B á 9. floksstigi

| **Próvtal** | **Heiti** | **Lýsing** |
|---|---|---|
| **12** | Framúr gott | Próvtakarin lesur raðið við týðiligum framburði og góðari lesiferð. Hann/hon vísir við tónalagi, áherðslu og natúrligum steðgum, at hann/hon hevur skilt tekstin til fulnar. Ongar ella bert týdningarleysar villur eru í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er sera greið og væl skipað. Málið í framløguni er fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er sera virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið tilfarið á góðan hátt, og viðgerðin er sera væl grundað við ongum ella bert fáum týdningarleysum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur gott tak á háttalagi og dugir sera væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga.<br><br>Synopsan er framúr væl skipað og orðað, og próvtakarin evnar greidliga at taka fram týðandi tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í hugdýpingarøkinum. |
| **10** | Sera gott | Próvtakarin lesur raðið við týðiligum framburði og góðari lesiferð. Hann/hon vísir við tónalagi, áherðslu og natúrligum steðgum, at hann/hon hevur skilt tekstin til fulnar. Nakrar villur eru tó í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er greið og væl skipað. Málið í framløguni er sum heild fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið á góðan hátt, og viðgerðin er væl grundað, tó við nøkrum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur gott tak á háttalagi og dugir væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga.<br><br>Synopsan er sera væl skipað og orðað, og próvtakarin evnar væl at taka fram tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í hugdýpingarøkinum. |
| **7** | Gott | Próvtakarin lesur rímiliga raðið við rímiliga týðiligum framburði og góðari lesiferð. Hann/hon vísir so nøkulunda við tónalagi, áherðslu og natúrligum steðgum, at hann/hon hevur skilt tekstin. Fleiri villur eru tó í upplestrinum. |

| | | |
|---|---|---|
| | | Munnliga framløgan er sum heild góð og rímiliga væl skipað. Málið í framløguni er rímiliga fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið heldur trilvandi, men viðgerðin er tó rímiliga væl grundað, tó við fleiri manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi og dugir at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga.<br><br>Synopsan væl skipað og orðað, og próvtakarin evnar at taka fram tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í hugdýpingarøkinum. |
| **4** | Hampiligt | Próvtakarin lesur rímiliga raðið við rímiliga týðiligum framburði og rímiligari lesiferð. Hann/hon vísir so nøkulunda við tónalagi, áherðslu og natúrligum steðgum, at hann/hon hevur skilt tekstin. Fleiri grovar villur eru tó í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er í lagi og rímiliga væl skipað. Málið í framløguni er í lagi, men ikki serliga fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er sum heild virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið trilvandi, men viðgerðin er tó rímiliga væl grundað, tó við fleiri stórum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon sum heild hevur tak á háttalagi og sum heild dugir at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar tó illa at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga.<br><br>Synopsan er rímiliga væl skipað og orðað, og próvtakarin evnar rímiliga væl at taka fram tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í hugdýpingarøkinum. |
| **02** | Nøktandi | Próvtakarin lesur ikki serliga raðið, men heldur orð fyri orð. Framburðurin er ikki serliga týðiligur, og hann/hon megnar so dánt at vísa, at tað lisna er skilt. Fleiri grovar villur eru í upplestrinum.<br><br>Munnliga framløgan er trilvandi og hongur ikki væl saman. Framløgan er skillig, men málsliga veik. Próvtakarin er ikki serliga virkin í fakligu samrøðuni. Viðgerðin er grunn og heldur illa skipað, tó er hon á einari leið. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi, men megnar sum heild illa at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild ikki at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga.<br><br>Synopsan er veikt skipað og orðað, og próvtakarin evnar so dánt at taka fram tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í hugdýpingarøkinum. |
| **00** | Ikki nøktandi | Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur fakligu málini í lærugreinini. |

| | | |
|---|---|---|
| **-3** | Heilt vánaligt | Verður givið fyri heilt vánaligt avrik, ið als ikki stendur mát og als ikki lýkur fakligu málini í lærugreinini. |

# 4. Ársætlan og undirvísingargongdir

Tíðliga í skúlaárinum skal ársætlanin fyri lærugreinina vera tøk. Ársætlanin er eitt yvirskipað skjal við yvirliti yvir ráðlagdar undirvísingargongdir fyri skúlaárið.

Lærarin skal so hvørt í undirvísingini gera ítøkiligar lýsingar av hildnum undirvísingargongdum. Nakað fyri skúlaárslok skulu undirvísingargongdirnar fyri farna skúlaár skrivast lidnar. Endamálið við undirvísingargongdunum er at skjalfesta, at undirvísingin hevur lokið krøvini í galdandi námsætlanum. Undirvísingargongdirnar eru eisini støði undir munnligu próvtøkuni og verða latnar próvdómara.

Víst verður til skjølini: “Leistur – ársætlan fyri lærugrein” og “Leistur – undirvísingargongd”.